## Terry fekk gyltan sáttmála

Liðformaðurin hjá Chelsea hevur nú aftur fingið lønarhækking. Óvissa var í summar um framtíðina hjá John Terry, tí Manchester City fríggjaði ófrøt til hansara, men Terry valdi at halda fram í Chelsea. Nú hevur Terry fingið eina nýggja og enn betri sáttmála, sum tryggjar honum einar 340 milliónir krónur næstu fýra árini. Bert Robinho, sum spælir fyri Manchester City, kann reypa sær av eins stórari løn í Premier League.



## Ótangi steðgaði dysti

Dysturin millum Iraklis og Aris í griksku fótbóltskappingini um vikuskiftið mátti steðgast, eftir at ein áskoðari hjá Iraklis hevði gjørt seg inn á málmannin hjá Aris. Áskoðarin rann inn á vøllin tíðliga í dystinum og sló málmannin hjá Iraklis. Dysturin varð steðgaður í 45 minuttir, men so varð spælt víðari, og úrslitið gjørdist 2-2.



KÍ-venjarin, Petur Mohr, og hjálparvenjarin, Aleksander Djordjovic, tosa saman undir dystinum ímóti AB í gjár
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

# Nokk at arbeiða við

**Petur Mohr, sum aftur er venjari hjá KÍ, heldur landsliðssteðgin komandi tvær vikurnar koma væl við, tí »har er nokk at arbeiða við«, sum hann málber seg. – Men tað sær ikki so galið út, sigur hann**




Hilmar Jan Hansen

Tað eru 18 ár, síðani Petur Mohr í 1991 gjørdi KÍ til føroyameistarar, og tá hann í gjár stóð á odda fyri liðnum í Klaksvík, vóru fýra av spælarunum frá tí árinum partur av dystinum. Jákup Mikkelsen vardi málið, Jan Andreasen spældi í verjuni og Todi Jónsson í álopinum, meðan Allan Mørkøre hesa ferð var við sum venjari hjá mótstøðuliðnum, AB.

Enn hevur Petur ikki havt so góðar stundir at sett sín dám á liðið, tí hesa vikuna, síðani hann tók við sum KÍ-venjari, hevur hann bara havt tríggjar venjingar saman við liðnum. Dysturin endaði við 1-1 javnleiki, sum – hóast stig – kanska ikki var tað, klaksvíkingar høvdu mest ynskt sær.

– Høvdu vit vunnið, so hevði tað sæð betri út. Men tað ber væl til enn, tí ivist eg einki í. Í hesum dystinum haldi eg, at vit vóru væl betri í fyrra hálvleiki og høvdu møguleikan at skora, men í seinna hálvleiki vikna vit eitt lítið sindur. Vit kanska høvdu onkrar skaðar, tí Hjalgrím og Todi vóru lappaðir til og høvdu trupulleikar í seinna hálvleiki, so tað bleiv eitt sindur veikari hjá okkum tá. Men bíða nú, har eru møguleikar framvegis, segði Petur eftir dystin.

### Við gott mót

Eftir javnleikin ímóti AB í gjár, hava Petur Mohr og KÍ fimm dystir aftrat at gera ein vørr í. Men næsti dysturin verður ikki fyrr enn um tvær vikur, tí nú kemur ein steðgur, meðan landsliðið fyrst á útivølli skal spæla ímóti Eysturríki og síðani á heimavølli ímóti Litava.

– At vit fáa ein steðg nú í tvær vikur, er útmerkað og kemur øgiliga væl við, tí vit hava nokk at arbeiða við, staðfesti Petur, ið samstundis viðgekk, at hesa vikuna høvdu slett ikki verið stundir at vant eitt nú deyðbóltsstøður, sum fleiri vóru av í dystinum ímóti AB – serliga í fyrra hálvleiki, tá KÍ var við yvirlutan og hevði nógv spæl.

Endin á dystinum fór fullkomuliga til spillis, og tað var eisini nakað, »nýggi« KÍ-venjarin legði til merkis, so hann helst eisini fer at arbeiða við at fáa spælararnar at halda fokus allan dystin á tamb.

– Tað virkaði øgiliga barnaktugt, at brúka tíðina uppá at koyra á dómarin og annað sovorðið fjas, sum einki hevur upp á seg, heldur enn at royna at skora mál. Dómarin dømdi fínt og kláraði seg útmerkað, segði Petur, ið er við gott mót.

– Eg haldi, tað sær ikki so galið út. Tað skal nokk fara at ganga hjá okkum.

## Petur fyri fimtu ferð

Annað árið á rað hevur Petur Mohr tikið við sum venjari hjá KÍ í úrtíð. Í fjør, tá hann tók við eftir Eyðun Klakstein, eydnaðist at bjargað liðnum eitt triðniðasta pláss, við fimm stigum niður til eitt pláss hinu megin strikuna.

Nú Petur aftur er í Klaksvík, er tað annars tilsamans fimtu ferð, at hann hevur tikið á seg leiklutin sum eitt slag av einum »bjargingarmanni«, tí ta uppgávuna hevur hann havt tríggjar ferðir fyrr í tveimum øðrum feløgum.

Í 2002 tók hann við sum venjari eftir Paula Jarnskor í ÍF, sum tá var í næstbestu mansdeildini. Árið eftir var Sigfríður Clementsen settur í starv og fekk ÍF upp, men í 2004 gekk ikki eftir vild í bestu deildini, og so vóru aftur boð eftir Peturi. ÍF endaði næstniðast, men tá var skipanin við upp- og niðurflytingardystum, og har tapti ÍF 1-0 í fyrra dystinum ímóti B71, men vann 5-1 í seinna dystinum – og yvirlivdi.

Longu aftur árið eftir, í 2005, var Petur Mohr tilkallaður, eftir at GÍ hevði givið Krzysztof Popczynski sekkin, og her stóð so nógv á, at GÍ ta einu løtuna í seinasta dystinum ímóti Skála var niðri, men í evstu løtu fekk bjargað sær næstaftasta plássið. Enn eina ferð var tað B71, sum skuldi spæla upp- og niðurflytingardystir, men GÍ vann báðar við samlaða málmuninum 7-1 – og yvirlivdi.

*hil*

## Dystir eftir

| | |
|---|---|
| 12/09 | ÍF-KÍ |
| 16/09 | B68-KÍ |
| 20/09 | KÍ-07 Vestur |
| 27/09 | HB-KÍ |
| 03/10 | KÍ-EB/Streymur |